# Viðtøkur fyri "Foreldraráðið fyri dagstovnaøkið í Tórshavnar kommunu"

## Endamál.

**§ 1.** Foreldraráðið, sum umboðar øll foreldraráð á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu, virkar fyri at fremja áhugamál barnanna og foreldranna, sum ráðgevi hjá kommununi í málum sum viðvíkja dagstovnaøkið.

## Heiti.

**§ 2.** Foreldraráðið fyri dagstovnaøkið í Tórshavnar kommunu.

## Foreldraráðslimir.

**§ 3.** Í ráðið skulu veljast persónar, sum frammanundan eru limir í einum av foreldraráðunum á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu.

## Atkvøðurættur.

**§ 4.** Í mesta lagi tvey umboð frá foreldraráðnum fyri hvønn stovn verða vald innanhýsis av foreldraráðnum til at umboða sítt foreldraráð á felags foreldraráðsfundinum.
Hvørt foreldraráð hevur eina atkvøðu.

## Ráðið.

**§ 5.** Foreldraráðið fyri Tórshavnar kommunu verður samansett av trimum ella fimm limum. Ávikavist verða tveir ella tríggir limir valdir í líkatals ári ella ávikavist verða ein og tveir limir valdir í ólíkatals ári.
Í ráðið vera tveir varalimir valdir eftir somu skipan sum ráðsval.

Stk. 2. Foreldraráðið skipar seg sjálvt við forfólki og næstforfólki.

Stk. 3. Deildarleiðarin fyri dagstovnaøkið er limur í ráðnum, men hevur ikki atkvøðurætt.

Stk. 4. Fer barn hjá ráðslimi úr stovninum, skal viðkomandi úr ráðnum og varalimur tekur sætið í staðin.

## Felags foreldraráðsfundur.

**§ 6.** Foreldraráðsfundur fyri øll foreldraráðini í Tórshavnar kommunu verður hildin á heysti eina ferð um árið við hesi dagsskrá:
1. Frásøgn frá foreldraráðnum fyri dagstovnaøkið í Tórshavnar kommunu
2. Val av limum og varalimum til foreldraráðið
3. Viðger av innkomnum málum.
4. Ymiskt.

Stk. 2. Fráboðan um felags foreldraráðsfund skal vera send øllum foreldraráðum skrivliga við 21 daga varningi.

Stk. 3. Uppskot, sum skulu viðgerast á felags foreldraráðsfundinum, skulu skrivliga vera ráðsforfólkinum í hendi seinast 14 dagar fyri fundin.

Stk. 4. Avgerðir vera tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

**Yvirskipaðir arbeiðskarmar hjá ráðnum.**

**§ 7.** Foreldraráðið fyri dagstovnaøkið í Tórshavnar kommunu ásetur sjálvt sína fundarskrá, reglur fyri dagsskrá, fundarinnkalling og ráðsins arbeiðshátt.

Stk. 2. Ráðið hevur tveir fastar fundir um árið, og kann kalla inn til fleiri fundir, um tørvur er á hesum. Fundir vera fastlagdir í samstarv við Barna- og ungdómsdeildina.

Stk. 3. Dagsskrá og fundarfrásøgn skal sendast til Barna- og ungdómsdeildina.

Stk. 4. Til limirnar í foreldraráðnum fyri Tórshavnar kommunu verður veittur vanligur fundarpeningur svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald, sum er ásett av Fíggjarmálaráðnum.

Stk. 5. Barna- og ungdómsdeildin veitir fundarhøli og skrivara til foreldraráðið.

**Heimild.**

**§ 8.** Ráðið er eitt yvirskipað samskiftislið millum foreldur og kommunu hvat dagstovnaøkinum viðvíkur. Ráðið veitir kommununi ráð í spurningum, sum viðvíkja dagstovnaøkinum sum heild.

Stk. 2. Í málum, sum kommunan metir er viðkomandi fyri børn og foreldur á dagstovnaøkinum, kann kommunan spyrja foreldraráðið til ráðs.

Stk. 3. Foreldraráðið fyri Tórshavnar kommunu kann av sínum eintingum siga býráðnum sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri foreldur og børn á dagstovnaøkinum, koma við hugskotum og uppskotum.

**Ábyrgd limanna.**

**§ 9.** Hvør limur í ráðnum hevur tagnarskyldu um øll viðkomandi viðurskifti sum hann fær kunnleika um á ráðsfundi ella á annan hátt. Tagnarskyldan er eisini galdandi eftir at limur er farin úr ráðnum. Hvør ráðslimur skal undirskriva eina váttan um tagnarskyldu.

**§ 10 Gildiskoma ella íverksetan**

Viðtøkurnar koma í gildi, tá tær eru samtyktar í mentamálanevndini.

## § 11 Broytingar í viðtøkunum

Foreldraráðið, ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til mentamálanevndina um broytingar í viðtøkunum.

Stk. 2. Mentamálanevndin kann koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum.

Stk. 3. Broytingar í viðtøkunum koma í gildi, tá tær eru samtyktar í mentamálanevndini.

## § 12 Um at taka foreldraráðið av

Mentamálanevndin kann altíð gera av, at foreldraráðið verður tikið av. Áðrenn tílíka avgerð verður málið í góðari tíð frammanundan lagt fyri foreldraráðið til ummælis.